

*Áhugin fyri Trapputinginum var avbera stórur. Fólk sótu og stóðu í hvørjum horni.*

*- Tað kostar at røkka Kyoto, og tað krevur mót at taka týðandi avgerðir. Hetta fer vónandi at vísa seg týsdagin í tinginum.'*

*Klæmint Weihe, stjóri í SEV*

*- Vinnan hugsar rationelt og økonomiskt, so metingin gongur uppá, um tað svarar seg fíggjarliga. Oljan er dýr, so ongin brúkar meira enn neyðugt.*

*Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

*- Tað ber ikki til at heita á fólk um at rinda skatt ella at skikka sær pent í ferðsluni. Tí mugu vit seta krøv og melda greitt út politiskt.*

*Bogi Hansen, professari í havumhvørvi*

- Vit skulu arbeiða fyri at gerast óheft av jarðrunnum brennievnum. Í 2015 skulu 20 prosent av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orkukeldum í mun til 9 prosent í dag. Og í 2015 skal fiskiflotin nýta 15 prosent minni orku í mun til veiðinøgdina, bar hann fram.

### Hugsa globalt – broyt lokalt

Agenda21 ráðgevin, Bergmann Finnsson, greiddi frá um Agenda21 hugtakið, sum snýr seg um, hvat vit kunnu gera lokalt. Hann segði millum annað, at tað ræður um at broyta hugburð, so vit øll kenna okkum sum ein part av loysnini.

- Land og kommunur eiga at ganga á odda. Eitt nú ber til at spara eini 30 prosent av orkuni, við at bjálva bygningar væl. Her hevur tað týdning, at vit hugsa langsiktað, tí tað kostar kanska 10 prosent eyka at hugsa orkusparing í sambandi við skúlabyggingar og líknandi, men í síðsta enda loysir tað seg kortini væl fíggjarliga.

Sambært Bergmann Finnsson er ein av uppgávunum hjá Agenda21 ráðgevingarstovunum eisini at upplýsa børnum og ungum um orku og umhvørvi, soleiðis at tey vaksa upp sum tilvitaðir brúkarar. Eitt nú við verkætlanum sum Grønur Skúli.

- Í framtíðini verður tað eitt fólksligt krav frá kundunum, at vørur og tænastur eru framleiddar undir skilagóðum umstøðum, segði hann eisini.

### Krevur dirvi

Sambært Klæmint Weihe, stjóra í SEV, eru Føroyar nógv betur fyri enn OECD londini sum heild. Býtið millum termiska og vatn/vind orku í Føroyum er 55/45, og málið hjá SEV er, at býtið skal vera 45/55 í 2015.

Hann bar fram, at hann tekur undir við orkuálitinum, men, at hann eftirlýsir, at peningur verður settur av á fíggjarlógini til førleikamenning innan orku.

- Tað kostar at røkka Kyoto, og tað krevur mót at taka týðandi avgerðir. Hetta fer vónandi at vísa seg týsdagin í tinginum, segði hann.




*Bogi Hansen legði ikki fingrarnar ímillum í framløgu sínari*

Pedagogfelagið:

## Limafundur um eldrapolitikk

**Týskvøldið skipar Pedagogfelagið fyri limafundi í Miðlahúsinum. Evnið á fundinum verður eldrapolitikkur.**

Sambært Maud Vang Hansen, næstforkvinnu í Føroya Pedagogfelag, setti felagið ein arbeiðsbólk á seinasta aðalfundi. Hesin skuldi arbeiða við at orða ein møguligan eldrapolitikk, og hevur hon havt ábyrgdina fyri hesum arbeiðinum.

- Í annaðkvøld fara vit at framleggja úrslitið av einari kanning, sum snýr seg um hugburðin hjá limum felagsins um eldri á arbeiðsplássinum, sigur Maud Vang Hansen.

Á fundinum fer Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, eisini at hava eitt upplegg um, hvat bilgist á politiska pallinum viðvíkjandi hesum evninum.

Eisini fara Sámal og Ronni at leggja út við at spæla nøkur løg, sum hava tilknýti til evnið.

Aftaná framløgurnar verður lagt upp til orðaskifti millum limirnar, sigur Maud Vang Hansen.

Tiltakið, sum er fyri limir felagsins, verður í Miðlahúsinum í annaðkvøld, týskvøldið, klokkan 19.30.